ÚTOYGGJAFELAGIÐ

Kjalarvegur 3
FO-700 Klaksvík
Tlf. +298 292592
utoyggj@gmail.com
www.utoyggj.fo

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
P.O. Box 347
FO-110 Tórshavn

Syðrugøta 06.11.2017

**Att: Høgni Hoydal, landsstýrismaður**

**Umbøn um atgerðir á fuglaveiðuøkinum**

Í fleiri ár hava útoyggjarnar sjálvbodnar, við samtykt á grannastevnum, fylgt ynskinum frá myndugleikunum um ikki at fleyga lunda, orsaka av at stovnurin er hóttir.

Men samstundis sum tey á útoyggjunum ikki loyva sær at gagnnýta tað fuglatilfeingið í búleikast har, so fer ein ógvuslig veiða ígongd stutt eftir at bútíðin er liðug. Stórt tal av bátum, harav fleiri skjóttgangandi, veiða svartfugl í túsunda tali.

Hetta meta útoyggjafólk ikki gevur nakra meining - at verja fuglin við ikki at fleyga, tá hann verður skotin av øðrum so skjótt hann kemur á sjógv.

Útoyggjafólk kunnu ikki fáa sær til eginnýtslu, ja ikki so frægt sum til eitt kók, meðan onnur veiða fuglin beint fyri nøsini á teimum í stórum talið - ikki bara til eginnýtslu, men eisini til at selja, eitt nú á facebook, fyri uppí 175,- kr. stykkið.

Vit hava ferð aftaná ferð gjørt vart við, hjá avvarðandi myndugleikum, at hetta vendir ikki rætt, og at tað er neyðugt við góðum og greiðum fyriskipanum á hesum økið, so fuglastovnurin verður troyttur burðardygt og útoyggjarnar fáa sín sjálvsagda part

Tí fara vit at heita á teg, sum hægsta myndugleika á økinum, um at fáa nevndu viðurskifti í rættlag.

Kemur hetta ikki upp á pláss, síggja vit ikki aðra gongda leið, enn aftur at loyva at fleyga fugl á útoyggjunum.

Vinarlig heilsan

Óla Jákup úr Dímun, formaður

Olga Biskopstø, samskipari